## DAGSINS MEINING

# Slóðbrótarin fær heiður og virðisløn

Stóri listarmaður okkara, Ingálvur av Reyni, fær Mentanarvirðisløn Landsins í ár. Listarmaðurin av Ingutrøð í Havn er ikki bara okkara størsti listarmaður. Hann telist harafturat millum teir heilt stóru myndlistarmenninar í Norðurlondum og Evropa. At veita Ingálvi av Reyi hesa mentanarvirðisløn er til tí heilt natúrligt og vælvalt.

Henda stóra heiður fær tann slóðbrótandi listamaðurin, nú hann stundar ímóti teimum áttati, og framvegis er nýskapandi í føroyskari list.

Listarliga gongdin brýtur ikki so nógv frá gongdini hjá øðru listarmonnum. Hjá mongu listarfólki hevur verið smáligt tey fyrstu árini, og tað sama var hjá Ingálvi. Men hann helt á, og sjálvt í raktíðini í fimtiárunum bjóðaði hann av, og fór sum tann fyrsti føroyski myndlistarmaðurin av álvara at mála nonfigrativar málningar.

Júst her kom kanska eisini tað skisma - um vit kunnu kalla tað so - millum listina hjá Ingálvi og vanliga føroyska áskoðaran. Hann skilti ikki, hví Ingávlur fór at mála, so hann einki skilti. "Gráur morgun". Grátt og svart. Hvat var hetta fyri nakað? Listarmaðurin, sum annars hevði málað seg inn í hjørtuni á føroyinginum - og kanska serliga havnarfólki - við friðsælum myndum av Tinganesi, Reyni, Niels Finsensgøtu o.s.fr. Men hetta var ein natúrligur liður í eini listarligari menning, sum vit kunnu hóma frá teimum fyrstu trilvandi royndunum frá árunum, áðrenn hann fór at fáa sær listarliga útbúgving í Keypmannahavn í stríðsárunum. Fyrst á tekniskúla og síðani á listarháskúlan, akademiið.

Eftir stríðslok setti hann seg niður sum listarmaður í heimstaðnum og her hevur hann virkað síðani, men hann hevur dúgliga leita sær út um eingjargararnar. Til stórbýin - serliga til París - at fáa sær íblástur. Men verkini hevur hann skapað í Føroyum og eftir at hann fór at abstrahera seg frá tí realistiska ella naturalistiska hevur hann hildið seg til ta meira og minni abstraktu listina. Tað er rætt, sum sagt verður í grundgevingini fyri at lata honum Mentanarvirðisløn Landsins, at hann hevur flutt mørk sum fáur. Tað er eisini tí, at hann telist millum teir stóru og hevur fingið viðurkenning i øllum Norðurlondum.

Hansara mannalýsingar eru framúr. T.d. tekningar av dótturini ella mammuni. Og hann hevur eisini duga at flutt huglagið á kaffistovum í París ella øðrum býum yvir á pappír, so tú kennir teg á staðnum.

Vit ynskja tí stóra og fólkakæra listarmanninum hjartaliga tillukku og vóna at síggja nógv afturat frá hansara hond.

## NØVN Í VIKUNI

# Ingávlur heiðraður

Mentanarvirðisløn Landsins verður í ár latin Ingálvi av Reyni, myndlistamanni. Virðislønin er kr. 150.000.

Landsstýrismaðurin í mentamálum letur Mentanarvirðisløn Landsins eftir tilmæli frá nevnd umboðandi føroysk listafólk.

Til tess at kunna fáa Mentanarvirðisløn Landsins skal virðislønarevnið hava skapað listarligt lívsverk á høgum listarligum støði ella hava skapað eitt ella fleiri listarlig avrik, ið gera, at viðkomandi má haldast at hava uppiborið ein heiður sum Mentanarvirðisløn Landsins.

Nevndin, ið sambært reglugerð ger tilmæli til landsstýrismannin, sigur m. a. í grundgeving síni:

»Ingálvur av Reyni hevur í myndlist síni víst á nýggjar leiðir og flutt mørk sum fáur. Sterku og eyðlýstu komposisjónir hansara og fjølbroytta avrik eru vitnisburðir um listamann, ið hevur sett sær høg mál og ásannað, at í listini eru einans tey strangastu krøv galdandi. Við trúfesti sínum ímóti sannari list hevur hann hesa seinastu hálvu øldina verið eitt fyridømi fyri øll føroysk listafólk.«

Mentanarvirðisløn Landsins verður handað á almennum hátíðarhaldi, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið skipar fyri í Norðurlandahúsinum mánakvøldið 30. oktober kl.20.00.



*Ingálvur av Reyni fær Mentanarvirðisløn Landsins*

### 60 ára føðingardagur

**Matita Petersen**, fyrrverandi løgmaður, fyllir í dag 60 ár. Marita er fødd í Vági. Hon er dóttir Sámal Johansen úr Haldórsvík og Annu Elisabeth (Bettu) f. Matras av Viðareiði. Hon er gift Kára D. Petersen, advokati.



Marita tók lærarprógv á Hellerup Seminarium í 1964. Hon hevur starvast sum lærari í Esbjerg, Keypmannahavn og í Tórshavnar Kommunuskúla frá 1967-89. Afturat lærarútbúgvingini hevur lokið prógv sum sjálvsnám í sálarfrøði, og hevur hon undirvíst m. a. á Lærarskúlanum og á Sjúkrasystraskúlanum. Marita Petersen varð vald á ting fyri Javnaðarflokkin í 1988. Í 1991 gjørdist hon landsstýriskvinna í skúla- og mentamálum - og í januar 1993 gjørdist hon sum fyrsta kvinna Føroya Løgmaður. Marita stillaði ikki uppaftur til løgtinsvalið í 1998. Hon hevur síðani 1. januar 1998 verið stjóri á Sernámsdeplinum.

### 25 ára starvsdagur

**Ellintur Abrahamsen,** skipari, hevur í morgin 25 ára starvsdag hjá Vaktar og Bjargingartænastuni. Ellintur er fuglfirðingur og hann er víða kendur millum fiskimenn í Føroyum. Við 25 árum á brúnni á føroyskum vaktarskipum, hevur Ellintur verið ein sjónligur partur av hesi ungu tænastu landsins. Tá Ellintur tók við starvi, sum yvirstýrimaður og skiparaavloysari 22. oktober 1975, átti vit ikki nakað rættuligt vaktarskip. "Tjaldrið" kom ikki fyrr enn í 1976. Í dag verður nýggja vaktarskipið "Brimil" fyri 96 milliónir



handað landstýrinum av skipasmiðju í Ullstein uttan fyri Aalesund. Vaktar og Bjargingartænastan er í dag vorðin ein fortreyt fyri nýtímans fiskiveiðu undir Føroyum og Ellintur hevur verið við til at ment hesa hentu og lívsneyðugu tænastu.

Ellintur hevur eisini verið sera virkin í fakfelagsarbeiði sum formaður í Skippara og Navigatørfelagnum og her koma rættuliga hansara evni at vera treiskur og halda út til sjóndar. Hann hevur vunnið starvsfeløgunum mangan bita í sínum ótroyttiliga fakfelagsarbeiði.

Ellintur var øll árini skipari við Ólav Halga, meðan hesin var vaktarskip. Hann var eisini sum heilt ungur við Ólav Halga til fiskiskap. Nú Ólavur er farin av landinum hevur hann ferðast sum ein annar beduinur millum hini skipini hjá Vaktar og Bjargingartænastuni. Skipari á Gorm og í løtuni skipari á Tjaldrinum. Vit ynska Ellinti tillukku við starvsdegnum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov Eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Hjørdis Árnadóttir hjordis@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
bokhald@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lystorg@sosialurin.fo
innsent@sosialurin.fo
tiltok@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14:00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán. kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Brimil er fýra skip í einum

**Brimil, sum verður handaður landsstýrinum í dag, er vaktarskip, bjargingarskip, umhvørvisskip og skúlaskip**

VAKTARSKIP
*Áki Bertholsen*



*Brimil er eitt stásiligt vaktarskip*

**Ullstein, Sosialurin:** Vaktarskipið Brimil verður handað landsstýrinum í dag, men um skipið kemur at sigla beinanvegin er heilt óvist. Enn er ikki semja fingin millum landsstýrið og maskinmeistarafelagið og uttan maskinmenn, sleppur Brimil ikki úr Noregi.

Men skipið verður handað eigarunum, tað vil siga landsstýrinum, í dag. Tað verður kona fiskimálaráðharran, Annelena Niclasen, sum fer at geva skipinum navn. Og navnið er ikki nøkur loyna longur.

Bæði Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og Kristin Rasmussen, sum hevur verið í projektbólkinum, sum hevur fyrireikað skipið, eru samdir um, at hetta er eitt gott skip.

Kristin Rasmussen sigur, at tað hevur verið ein trupul uppgáva at fyrireika hetta skipið, tí tað hevur so fjølbroyttar uppgávur at røkja.

– Í veruleikanum hava vit fingið fýra skip í einum. Brimil er bæði vaktarskip, bjargingarskip, umhvørvisskip og skúlaskip hjá sjómannsskúlanæmingum, sigur Kristin Rasmussen.

Brimil er 63,3 metrar langur og 12,6 metrar breiður. Hvussu skjótt skipið siglir, er ein hemmiligheit, men vit hava fingið uppspurt, at 17 míl gongur Brimil í hvussu er.

Brimil kostar 95 milliónir og er bygdur á Myklebust skipasmiðjuni í Ullstein beint uttan fyri Aalesund.

Umboð fyri fjølmiðlarnar, myndugleikarnar og onnur, sum hava havt við byggingina at gera, eru við til hátíðarhaldið í Noregi. Í dag fer skipið sýningartúr fyri gestunum.


# TILBOÐ ...

*...hví geva tilboð, um tað ikki er eitt **rættiligt** tilboð?*






*Allir prísir eru kontant-prísir!*

*Fyrimunir við at keypa hvítvørur frá LM-Handlinum:*
- *Kappingarførir prísir*
- *LM-handilin hevur sína egnu tænastu-deild, ið er virkin 24 tímar um samdøgrið*
- *LM-handilin veitir 2 ára garanti*
- *LM-handilin veitir og setur til hvítvørur og burturbeinir tær gomlu - ókeypis**
- *LM-handilin hevur verið førandi á økinum í meira enn 65 ár*
- *LM-handilin hevur útbúgvið starvsfólk, ið altíð veitir bestu tænastu.*

** Treytað av at landfast er, har koyrt verður til*

LM HANDILIN

LM-Handilin • Smyrilsvegur 2 • Tel 31 12 20 • Boks 3100